planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

planet.fo

# Romantiskt & forvitnisligt



**LIVA: romantiskur stemningur, kunnandi fyrilestrar og forvitnisligir básar**

Tað fyrsta, sum rann mær til hugs, var hvussu hugnalig hendan annars stóra og ófantaliga høllin var blivin. Purpurlittu ljósini, trøini, roykurin og snøggi pallur var sum fyrsta inntryk eitt sera jaligt inntryk.
Komin inn í høllina hugsaði eg, at básarnir vóru einfalt uppsettir, soleiðis at ein ikki noyddist (sum við vanligum sølustevnum) at ganga høllina upp og niður fyri at finna tað, sum ein hevði áhuga í.
Sum við vanligum sølustevnum vóru eisini klædnahandlar umboðaðir, men hetta var tó ikki tað, sum merkti upplivingina. Tað sum var sermerkt, og sum gjørdi LIVA øðrvísi enn sølustevnur var, at nógvir fyrilestrar umframt básar vóru, sum veruliga skiltu seg burtur úr mongdini, og sum umboðaðu nakað, sum føroyingar flestir ikki eru vanir við.
Millum tilboðini var ein sokallað acu-graph kanning, har møguleiki var at kanna, hvussu nógva orku ein hevði, og um javnvág var í kroppinum. Kinesiska kvinnan greiddi eftir fáar kanningar frá, hvussu organini í kroppinum vóru fyri. Long kø var til acu-graph kanningina allan dagin, og eftir øllum at døma vóru kvinnurnar, sum vitjaðu hendan básin, sera væl nøgdar.
Yoga var eisini partur av vælveru-konseptinum hjá LIVA, og har var ein yogalærari, sum greiddi áhugaðum frá nøkrum einkultum yoga venjingum, umframt at ein fekk innlit í, hvussu yoga betrar um heilsuna.
Á sálarliga økinum var kærleikin eisini umboðaður. Millum annað var ein sexologur á staðnum, sum greiddi áhugaðum frá, hvat kærleiki hevur av týdningi fyri vælveruna hjá tí einstaka, umframt at kærleiksbásurin gav fólki møguleika at seta seg í samband við innastu kenslurnar og at koma inn í kjarnuna av kenslum, sum annars væl og virðiliga eru fjaldar frá yvirflatuni.
Kærleiksbásurin hevði eisini nøkur sokallað einglakort, sum høvdu til endamáls at geva jalig ráð. Eg fekk eitt tankakort...
- Tankakort merkir, at tú skalt koma út við tínum tonkum, tí teir eru jaligir, og einglarnir siga, at tað er tørvur á tínum tonkum í samfelagnum, og at bert jalig ting kunnu koma frá tí, segði Marit Holm Petersen, kærleikscoach.
Hóast eg hevði míni ivamál um tey sokallaðu einglakortini, so var hetta eitt jaligt ískoyti til tiltakið.

**FK og tai matur**
Eg gekk runt í høllini og bleiv heldur bilsin av at síggja, at FK hevði ein bás. Hvat hevur FK við vælveru at gera? Eg spurdi Bo, ein av umboðunum frá FK, hendan spurningin.
- Hetta er fyrstu ferð, at vit eru við á einum slíkum tiltaki, og vit mettu tað verða eitt gott høvi at upplýsa fólk um, hvat er heilsugott og ikki, sæð út frá okkara vørum, segði hann.
Í básinum hjá FK vóru eisini smakkiroyndir frammi, og fyri okkum mongu, sum ikki altíð eru vís í, hvat er sunt og ikki, var tað gott at fáa høvi at seta nakrir spurningar til serfrøðingarnar.
Tailendskur matur var eisini á skránni, og tað einasta neiliga at siga um hetta var, at køin til buffet'ina var so mikið long, at tað var eingin møguleiki hjá okkum at fáa okkum eina smakkiroynd av matinum. (men tað er bara jaligt fyri fyrireikararnar)

**Móta katastrofa**
Nú koma vit tað til neiliga. Eg má staðfesta, at mótaframsýningarnar vóru á ótrúliga lágum støði. Tað tóktist sum at modellirnar ikki vistu av, at tær gingu á einum palli, og uppsetingin var sera einføld, og heldur sølustevnukend. Hóast nógvir ymiskir handlar, var hvør mótasýning 100 prosent eins, og einki var gjørt burturúr at skapa eitt show. Tað líktist mest einum spaseritúri á einum palli.
Vælvitandi um, at hetta ikki er ábyrgdin hjá fyrireikarunum av LIVA, so hugsaði eg, tá mótaframsýningin var komin at enda, at tað var óheppið fyri fyrireikararnar, at handlarnir ikki høvdu tikið LIVA í álvara, ella ikki høvdu førleikar at skipa fyri einari veruligari mótaframsýning á høgum, ella í øllum førum hægri støði.
Men okkurt var jaligt við mótaframsýningunum. Tað, sum fyri mítt viðkomandi nærmast dró mótaframsýningarnar á eitt hægri støði var, at vertirnir á pallinum vóru framúrskarandi góðir. Sjáldsamt er at síggja slíkar væl fyrireikaðar vertir, og hóast kvinnan á pallinum einaferð misti tráðin, so bjargaði hon tí á ein slíkan hátt, at tað nærmast varð imponerandi. Avgjørt vertir, ið góvu tiltakinum eina ávísa tyngd.

**LIVA eitt avgjørt UG**
Sum heild var LIVA eitt gott tiltak, sum avgjørt var slóðbrótandi á nógvum økjum. Fyri meg var tað ein sera jaligt uppliving, og við tí í huga, at hetta var fyrstu ferð, at Annika Steintórsdóttir, Barbara Biskopstø, Olga Biskopstø og Jóngerð Biskopstø skipaðu fyri slíkari vælverustevnu má sigast, at tær megnaðu uppgávuna til eitt UG, og eg kann siga fyri mítt viðkomandi, at eg vóni, at tær halda fram við líknandi tiltøkum í framtíðini.
Kykmyndir frá LIVA eru á finna á portalinum.